# Mín besta **uppskrift**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



**UPPSKRIFT:** Jákup Mørk

# Hakkibúffur

## við bacon, rómasós og hasselbakaðum eplum (4 persónar)

| | |
|---|---|
| | **Búffar:** |
| 500 gr | malið neytakjøt |
| 4 skivur | av bacon |
| 2 | miðalstórir leykir |
| ½ dl | av reyðvíni |
| 2 ½ dl | av róma |
| 500 g | av eplum |
| Kryddarí | (groft salt, pipar, kryddurtar, hvítleyksbland) |
| | matolja |
| | kulør til sós |



**Hasselbakað epli**
Flys eplini og sker tættar rivur ígjøgnum tey
Pensla eplini við matolju
Stroyð eitt vet av salti og pipari á
Bakast ovarlaga í ovninum við 180 stigum í 1 tíma (bara yvirhita á ovninum)

**Búffar**
Forma neytakjøtið til 4 hakkibúffar
Legg eina skivu av bacon um hvønn og bind fast við bummulstráði
Steikjast á pannuni og krydda við salti, pipari, kryddurtum og hvítleyksblandi
Tá búffarnir eru stoktir, verða teir settir í fat, dekkaðir við staniol og settir niðarlaga í ovnin
(pannan skal ikki vaskast)

**Sós**
Sker leykin smátt og brúnka á pannuni
Tá leykurin er passaliga bleytur, verður reyðvínið latið yvir, soleiðis at kryddið verður bakað av pannuni
Koyr rómin á pannuna og lita sósina

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**
er nýggjur teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti

TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00

SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04



*Leif Vollebekk hevur gjørt sang við heitinum Don't Go To Klaksvik*

# Far ikki til Klaksvíkar

KANADISKUR TÓNLEIKARI HEVUR SKRIVAÐ SANG, SUM HANN KALLAR »DON'T GO TO KLAKSVIK«. HER ER ORSØKIN TIL SANGIN

**TÓNLEIKUR**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Fyri fimm árum síðani búði kanadiski tónleikari Leif Vollebekk í Íslandi í eitt ár. Hesa tíðina gjørdu hann og nakrir vinmenn ein túr til Føroya í nakrar dagar.

– Vit vóru í Havn, og tá vit søgdu, at vit ætlaðu okkum til Klaksvíkar dagin eftir, søgdu fólk við okkum »don't go to Klaksvik«, tí har er einki at fara eftir, sigur Leif Vollebekk.

Men hóast ávaringarnar í Havn, fóru teir avstað. Teir gjørdust tó ov seinir til ferjuna um Leirvíksfjørð.

– So hildu vit, at vit tað sama kundu fara aftur til Havnar. Vit høvdu ikki hug at bíða eftir næstu ferjuni, tí tað var neyvan nakað so áhugavert í Klaksvík, og so vóru vit kanska ikki so væl fyri tann dagin, sigur Leif Vollebekk.

## Ávaringin varð hangandi

Linjan »don't go to Klaksvik«varð hangandi í høvdinum á Leif Vollebekk, og hann skrivaði ein sang við tí heitinum.

– Eg angri, at eg ikki fór til Klaksvíkar, tí tá mann fer so langt at ferðast, so eigur mann at fara so langt, mann kann sleppa, sigur Leif Vollebekk.

– Kanska eg einaferð í framtíðini veruliga sleppi til Klaksvíkar, sigur hann.

Sangurin Don't Go To Klaksvik er ein ávaring ímóti býnum, men snýr seg líka nógv um at verða argur um ikki at hava tikið av einum møguleika.

Leif Vollebekk ljóðar norðurlendskt, og tað kemst ikki av ongum. Pápi hansara er úr Noregi, men Leif er føddur og uppvaksin í Kanada.